# Møguleikin at finna oljuna er til staðar

**Bjartskygni økist í oljuleitingini í føroyskum øki, so hvørt sum nýggj úrslit koma undan kavi**

FRØÐI

Hvat er tað, sum oljufólk so íðin leita eftir? Nú opnar Heri Ziska, jarðalisfrøðingur, gluggan inn í heimin hjá oljuleitingini, og greiðir frá, hví olja kann vera at finna í føroysku undirgrundini. Hví eru hesi fólk meira bjartskygd í dag enn fyri nøkrum árum síðan? Her er eitt einastandandi høvi at fáa innlit í, hvussu oljufólk leita eftir tí oljuni, sum kann gerast ein kollvelting fyri føroyska samfelagið!

Soleiðis sigur ritstjórnin fyri Frøði í tíðindaskrivi.

Basaltknúturin er stóra forðingin fyri oljuleiting í føroyskum øki, men hvat er basaltknútur fyri nakað? Uni Petersen, sum eisini er jarðalisfrøðingur, lýsir, hvussu djúpa boringin á Glyvursnesi hevur varpað nýtt ljós á basaltknútin. Við slíkum úrslitum fer líðandi at bera til at loysa basalttrupuleikan og leita meir miðvíst eftir olju í undirgrundini.

Havøkið kring Føroyar verður illa dálkað

Havhestamagar við plasti og øðrum ruski seta spurnartekin við, um Føroyar hava heimsins reinasta hav longur. Jóannes Danielsen, lívfrøðingur, hevur kannað magar hjá havhestum, sum eru fangaðir í føroyskum øki. Úrslitini avdúka, at næstan allir havhestarnir vóru dálkaðir av plasti og øðrum ruski.

Føroya Fróðskaparfelag gevur út Frøði í samstarvi við granskingarstovnarnar í Føroyum. Í blaðnum hesaferð eru eisini greinar um kombikk, tjøruklukkuna, sum ofta rekst í kjallarum, og lúsakrabban, sum býr á grunnum vatni. Kirsten Brix lýsir nakrar stuttsøgur hjá Hanus Kamban og Marjun Kjelnes, sum viðgera tað at tora at liva.

Frøði kostar kr. 48 í leysasølu. Tað ber til at gerast haldari fyri kr. 85 um árið og fáa blaðið sent.






# Sungu jólini inn í Glyvra kirkju

**Undir hesum heiti var sangløta í Glyvra kirkju hetta seinasta sunnukvøldið í advent. Fjølbroytt skrá var fyri kvøldið, har trý ymisk kór luttóku. Krumtappurin í øllum var prestur, ið hevði úr at gera**

UMMÆLI
*Kári P. Højgaard*

Hann skuldi upp á loftið at spæla á urguna til prælúdium, niður at stjórna kórinum, spældi á klaver, sang við manskórinum, upp at spæla á orglið til teir tríggjar felagssálmarnar og postludium. Hann rann sum fluga í fløsku, og neyvan hevði nakar annar føroyskur prestur megnað at gjørt Meinhardi Bjartalíð kynstrið eftir.

Eftir samanringing, prælúdium og inngangsbøn varð felagssálmur 116 sungin. Kór Glyvra Kirkju sang sangirnar: Boð Gabriels, Nú ringja klokkur jólafest og Í krubbu barnið Jesus lá. Kirkjukórið luttekur vanliga og setur sín hátíðardám á gudstænasturnar, tá prestur luttekur ella við serstøk høvi. Nógv av teimum, ið syngja við kórinum, hava verið við í áravís. Vit, sum hava okkara regluligu gongd í kirkjuni, kunnu fegnast um, at Glyvra Kirkja hevur eitt tað besta kirkjukórið í landinum.

Sangurin ljómaði so vakurt og fylti kirkjurúmið, ongin ivi um, at hetta er sangur á høgum støði við avbera góðum songrøddum.

Felagssongurin, Jól hava einglaljóð, var síðani sungin, áðrenn Barnakór Glyvra Kirkju undir leiðslu av Jonny og Maritu sungu 8 sangir. Frelsari føddur, Advent, Vit bera frið, Her kemur hann, So gott og herligt er tað tá, Tá milliónir tendra ljós, Sledurock og We wish you a Merry Christmas. Í byrjanini vóru barnarøddirnar eitt sindur varnar, men tá Jonny við kropsmáli bað um meira »power«, ljómaði songurin hjá børnunum nærum líka hart sum hjá teimum vaksnu. Tá komið var til Sledurock, var lív komið í áhoyrararnar, ið við kropsrørslum livdu við í sanginum.

Fagur himin er at sjá, bleiv sungin sum felagssangur, áðrenn Manskór Glyvra Kirkju sang: "Mær er kensla í barmi". Tvey orð siga alt, vakurt og professionelt.

Kór Glyvra Kirkju sang: Eg rósu upp sá næla, Hvør fossur hongur frystur og Hirðanna vøgguljóð. Meðan felagskóri stóð uppi, stillaði barnakóri seg fremst og sang: Tað lýsti um kvirrar fløtur, meðan tey vaksnu tóku undir og sungu fleirrødda.

Seinast endaði Kór Glyvra kirkju við jólasálminum yvir øllum øðrum: Gleðilig jól.

Felagssálmurin: Føgur er foldin, varð sungin áðrenn útgangsbøn, biðisløg og postludium.

- Tøkk til Meinhard prest og tykkum øll, børn og vaksin, ið viðvirkaðu hesa kvøldarløtu. Tit góvu okkum áhoyrarum eina hugnaliga og ógloymandi løtu, har gleðiboðskapurin um Jesusbarnið, ið føtt var fyri tveytúsund árum síðani, var miðdepulin. Hendan hending, ið fekk ávirkan á seyðamenninar, hirðarnar og stóran part av heiminum, er líka viðkomandi og týdningarmikil fyri okkum sum liva í dag.

Tøkk fyri sangløtuna, blíðan byrð framyvir og

Gleðilig Jól.

# Fólkatal í Suðuroy 1801 – 1911

FÓLKATAL
*Tíðindaskriv*

Í 1999 gav Torgir Strøm í Porkeri út bøkurnar Fólk í Suðuroy 1584–1840. Hetta var tilfar, sum Johan O. Samuelsen, sjómansskúlalærari, hevði savnað úr kirkjubókum, tingbókum, pantiprotokollum, jarðarbókum, kongsbókini og fólkateljingum, og sum Torgir skrivaði inn á teldu og síðani gav út. Hetta er vælegnað tilfar hjá ættargranskarum.

Torgir hevur nú í fleiri ár skrivað fólkateljingar í Suðuroy inn á teldu. Síðani hevur hann gjørt broytingar, rættingar og tillagingar til hesar fólkateljingar (tann fyrsta frá 1801 og seinasta frá 1911). Hetta Fólkatal, sum nú verður givið út, er soleiðis ein tillaging úr fólkateljingunum. Er okkurt komið skeivt fyri í fólkateljingunum, er hetta rættað. Nøvnini eru tey somu, men stavsetingin er ikki altíð tann sama sum í fólkateljingunum. Heitini eru føroysk, og í staðin fyri aldur á fólki er føðingardagur og ár skrivað. Ymsar broytingar eru gjørdar við uppseting soleiðis, at tann raðfylgjan, sum er í fólkateljingunum, ikki altíð er fylgd.

Bøkurnar hava fingið heitið Fólkatal fyri at gera mun á hesum bókum og beinleiðis avskrivaðum fólkateljingum. Hesar bøkur eru at meta sum eitt slag av framhaldi av bókunum Fólk í Suðuroy 1584-1840, serliga ætlaðar fólki, sum fáast við ættarkanning, men vónandi eisini til gleði fyri onnur áhugað.

Í ár koma 4 bøkur út í A4 stødd:

Fólkatal fyri Sumba, Víkarbyrgi, Agrar og Lopra 96 síður
Fólkatal fyri Vág 80 síður
Fólkatal fyri Porkeri og Nes 71 síður og
Fólkatal fyri Hov og Fámjin 78 síður

Bøkurnar fáast fyri ávikavist 75 kr., 69 kr., 60 kr. og 60 kr. umframt flutning.

Ringið á telefon nr. 315854 ella telefon nr. 223274 ella skrivið teldupost til: pouhan@post.olivant.fo ella ringið á telefon nr. 373176 ella skrivið teldupost til: torgir@kallnet.fo

Ætlandi koma fólkatal fyri hinar bygdirnar í Suðuroy út fyrst í komandi ári.